# Eingin greipa í 11 ár

Enn hevur Kyndilmøguleika at koma í FM-finaluna, men alt bendir á, at tað heldur ikki í ár verður nakar greipuvinnari í føroyskum manshondbólti. Soleiðis hevur støðan eisini verið seinastu mongu árini, og leitast skal aftur til 1997, tá eitt sannførandi VÍF-lið vann bæði lands- og steypakapping. Síðani hevur StÍF fyri tað nógva sitið tungt á steypakappingini. Tvær ferðir – í 1999 og í 2003 tapti StÍF finaludystin, men í báðum førum endaðu teir árið við at vinna FM-heitið.



# Guttorm vann cross

Líkindini vóru ikki av teimum bestu, tá FM-kappingin í cross-renning varð runnin á Stovugólvinum á Svangaskarði. Teinurin, sum rennast skuldi, var 800 metrar við brekkum bæði upp og niður, og runnu menninir teinin átta ferðir. Vinnari av kappingini gjørdist Guttorm Sørensen, sum basti Borgar Biskopstø og Jósvein H. Olsen. Hjá mansungingum vann Jan Elmar Sørensen vinnari, meðan Rebekka Fuglø vann kappingina hjá kvinnuunglingum. Gentur og dreingir runnu tvey umfør, og her vunnu Monika Biskipstø og Dánjal Godtfred.

## FAKTA

**StÍF-Kyndil 23-28 (10-12)**
10 min: 2-5
20 min: 6-8
40 min: 14-15
50 min: 19-20

**Málskjúttar**
**StÍF:** David Edvardsen 7, Sveinur Justinussen 5, Bent Djurhuus 3, Leivur Justinussen 2(2), André F. Danielsen 2, Danni Syhler 2, Alexandur Johansen 1, Bárður Danielsen 1
**Kyndil:** Finnur Hansson 7, Hanus Johansen 4, Josef Abrahamsen 4, Høgni Klein 4, Hans Áki Dal Christiansen 4(1), Janus Einar Sørensen 3, Ken Zachariassen 1, Hjalti M. Jacobsen 1
**Brotskøst:** StÍF 3, Kyndil 2
**Útvísingar:** StÍF 5, Kyndil 2
**Diskvalifikatión:** StÍF 1 (3X2 minuttir), Kyndil 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

Og í álopinum var einki roks. Glopppaði strandaverjan tað allarminsta, vóru teir grønu klárir. Og langt ífrá bara við Høgna, sum næstan tykist hava fingið guddomiligan status í Kyndli. Heldur var talan um somikið breiða hóttan, at hvørki verjan ella Marian Cirloganescu megnaðu at gera nakað sum helst, og eftir bara einum korteri tóktist alt mest sum avgjørt. Støðan var tá 8-2 til Kyndil, og so tók StÍF sær eitt timeout, soleiðis at teir kundu gruna um, hvat í ólukkan hetta var, sum rakti teir.

### Sjónlig styrki

Steðgurin hjálpti eisini strandingunum. So hvørt sum teir togaðu seg alt nærri teimum grønu, leitaðu tankarnir eitt ár aftur, tá StÍF vann seg yvir líknandi skelk móti VÍF. Serstakliga tóktist Sveinur Justinussen at vísa vegin við nøkrum kanónkúlum inn um Lars Black, og stóri spurningurin var kanska, um Kyndil megnaði at standa móti trýstinum, sum nú kom.

Eitt trýst, sum eisini gjørdist størri bara seks minuttireftirsteðgin. Í eini roynd at steðga StÍF-mótáloi kom Lars Black ov seint út úr málinum. Og tá málverji loftast spælara ístaðin fyri bóltinum, so er bert ein vegur. Og dómararnir ivaðust heldur ikki, tá Lars fekk ostaskorpuna.

Men samstundis undirstrikaði hetta eisini týdningin, sum tað hevur hjá einum liði, tá tú eisini hevur ein klassamálverja á beinkinum.

Magnus Matras telist nevnliga eisini millum teir heilt frægu av slagnum. Ein løtu slapp StÍF at nærkast enn meira, og teir minkaðu eisini munin niður í eitt mál, men nærri komu teir ikki.

Magnus sveiggjaði spælið upp, og tá tað samstundis stóð greitt, at Marian Cirloganescu ikki hevði dagin, har vanligu undrini verða drigin fram á málstrikuni, valdu eisini teir at skifta málverja.

Og lat tað verða sagt, at Rasmus Magnussen als ikki hevði nakran vánaligan dag. Hann hevði fleiri góðar bjargingar, sum hildu StÍF inni í dystinum. Men hóast StÍF enn eina ferð fekk minkað munin niður í eitt mál, so var hetta ikki nóg mikið. Kyndil tók aftur yvir, og hóast strandingar vónaðu, at Marian kundi toga gandakynstrið fram seinastu løtuna, so hjálpti hetta lítið. Kyndilin fekst ikki at sløkna.

### Dýrar útvísingar

Og so hjálpti tað heldur ikki, at StÍF tvær ferðir á rað fekk heldur býttisliga útvísing. Fyrru ferðina, tá Alexandur bert fekk nøkur fá sekund á vøllinum, áðrenn hann yvirtendraður helt á fram at spæla, eftir at dómararnir høvdu bríkslað. Seinnu ferðina, tá Borgar ikki tóktist hoyra floytuna og har við fekk sína triðju útvísing og reytt kort.

Ikki minst hetta seinna var dyggur smeitur hjá StÍF. Sum kanska einasti strikuspælarin í landinm, so hevur Borgar nevnliga styrkina til støðugt at taka nærdystir við Janus Einar Sørensen. Og tí lætti tað munandi um álopspartin hjá Kyndli, tá Borgar noyddist út.

Í eini seinastu roynd vald StÍF at mansverja bæði Høgna Klein og Finnur Hansson. Men tá hevði Kyndil enn ein trumf eftir. Hanus Johansen hevði fyri tað nógva hvílt seg á beinkinum, men júst støður sum fýra móti fýra er satt guff hjá honum, og við trimum málum á rað sópaði hann allan iva um úrslitið fullkomuliga burtur. Kyndil er steypavinnari 2008, og tað varð gjørt við slíkum stíli, at onkur av áskoðarunum í løtununum eftir finaluna fóru at tosa um, at strandingar nú mugu syrgja fyri at tapa næsta dystin móti Neistanum. Hetta so teir ikki koma sær í vanda fyri at hitta Kyndil í FM-finaluni eisini!

# Sláa ikki til

**Bárður Danielsen helt, at StÍF ikki rakti dagin. Misnýttir møguleikar og býtt mistøk vóðu revsað, og so gjørdist brekkan ov tung**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Onkra ferð skal ein finala eisini tapast. Tann veruleikan máttu strandingar ásanna leygardagin, og Bárður Danielsen viðgekk, at kenslan var alt annað enn góð.

- Tað er munur á, hvat er stuttligari. Tað kann eg róliga staðfesta, helt hann.

*Hvat var tað, sum gekk galið hjá tykkum í dag?*

- Vit koma øgiliga illa ígongd, har tað er 8-2 einaferð. Og tað verður øgiliga tungt at vinna tann munin innaftur. Sjálvt um vit koma upp á eitt mál nakrar ferðir. Men hvørja ferð vit koma somikið nær, so brenna vit ella fáa eina býtta útvísing. Og so fara teir aftur frá okkum. Tað hendir fleiri ferðir í dystinum.

*Og so verður tað kanska ov tungt í longdini, tá so er?*

- Ja. Og so sláa vit bara ikki til í dag. Vit brenna for illa og gera for nógv býtt mistøk.

Men tær báðar ferðirnar, tá tit hava tapt steypafinalu áður, hava tit vunnið FM-heitið. Tað er kanska tað, sum farast skal eftir nú?

- Í løtuni hugsa vit sjálvandi bara um hetta beint nú, og lagið er í botni. Men sjálvandi. Vit liggja nummar eitt í landskappingini, so FM-heitið er avgjørt tað, sum vit fara eftir.

# Teir bóðu um tað

**Við lyftum um bank til Kyndil í finaluni vóru strandingar við til at koyra eyka á ketilin hjá Kyndli, helt Hans Áki Dal Christiansen**

**HONDBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hans Áki Dal Christiansen var ikki ósamdur í, at Kyndil var tað betur tendraða liðið á finaludegnum legyardagin.

- Ja, vit hava verið uppi at koyra, síðani vit vaknaðu, so vit vóru uppsettir. Vit avtalaðu, at vit skuldu hava eina ordiliga verju, og tað haldi eg gekk, tá teir bara fáa tvey mál fyrstu fimtan minuttirnar.

Nakrar ferðir minkað teir tó munin niður í bara eitt mál. Kendu tit tað nakrantáíð, sum um tit vóru við at missa dystin?

- Ikki ordiliga. Vit dalaðu kanska nakað í ferð, men vit kláraðu alla tíðina at koyra meira á, tá tað var neyðugt.

*So tit høvdu kanska alla tíðina tað yvirskotið, sum var neyðugt?*

- Ja. Men eg haldi eisini, at tá teir hava meldað út, at teir skuldu til Havnar at banka okkum av, so hava teir verið for høgir í hattinum. Men teir høvdu kanska ikki væntað at fáa mótstøðu.

*Og tað hevur kanska verið við til at sett tykkum eyka nógv upp?*

- Tja. Nú kunnu teir so í øllum førum fara at sleikja sárini heima á Skálafjørðinum. Tað var í øllum førum væl uppiborið, at vit vunnu.

Tað hevur verið sagt um hetta Kyndilsliðið, at tit ongan tíð hava tapt eina finalu. Er tað kanska so, at tit altíð vinna teir avgerandi dystirnar?

- Tað fái eg ikki svarað fyri. Eg havi faktiskt tapt eina finalun. Men tað var afturi í ’98 móti H71, so tað telur kanska ikki við, segði ein stórflennandi Hans Áki at enda.